MBM

TEAM85

# SOPI Lemon




## Javnvág & Vælvera

SOPI er ein føroyskur mjólkarúrdráttur, ið inniheldur virknar Lactobacillus acidophilus– og Bifido–bakteriur. Umframt at vera ein serstakliga leskiligur drykkur er høvuðságóðin við SOPA og øðrum mjólkarúrdráttum, at teir innihalda protein, vitaminir, kalsium og onnur mineral. Føðsluvirðið í SOPA, jogurt og flestum øðrum mjólkarúrdráttum er nærum eins, tí rávøran er ein og hin sama fyrstafloks, heilsugóð mjólk.

Vísindaligar kanningar vísa, at mjólkarúrdráttir við virknum bakteriugróðri kunnu hjálpa til at fáa javnvág í sodningarlagið, lækka blóðtrýstið, styrkja mótstøðuførið og hjálpa kroppinum at niðurberja ígerðarsjúkur. Fólk, ið taka penisillin, kunnu fáa skjótan bata í sodningarlagið við SOPA. Í fyrsta umfari fæst SOPI við tveimum smakkum: Hindberjum og lemon.

SOPI verður fastur partur av vøruskránni í flestøllum matvøruhandlum í landinum.

Væl gagnist

